# Debutsigur til Linderoth

Svenski miðvallarleikarin, Tobias Linderoth, sum eftir síðsta kappingarár skifti frá FC Keypmannahavn til Galatasaray í Turkalandi, fekk eina sera góða byrjan upp á fótbóltslívið í Turkalandi. Fyrsti dysturin í nýggja felagnum endaði við einum 4-0 sigri á Rizespor, og sostatt hevur nýggi venjarin, Karl Heinz Feldkamp, eisini fingið eina dreymabyrjan upp á kappingina, har kravið hjá Galatasaray er eitt betri úrslit enn í fjør, tá liðið endaði á einum skuffandi 3. plássi í liguni.



# Eriksson vil hava málmann

Um vikuskiftið fingu Manchester City og Sven Göran Eriksson eina dreymabyrjan upp á nýggja kappingarárið, tá teir vunnu 2-0 úti ímóti West Ham. Í málinum hjá City stóð bert 20 ára gamli Kasper Schmeichel, tí at vanligi fyrsti málmaðurin, Andreas Isaksson, er skaddur. Eriksson segði tó eftir dystin, at teir ætla sær ein nýggjan málmann, tí tað er ikki rætt at leggja eitt so stórt trýst á ein bert 20 ára gamlan málmann. Sum skilst stendur eykamálmaðurin á italska landsliðnum, Marco Amelia, ovarlaga á listanum hjá Eriksson.

# Gott lag á Newcastle-fjepparunum

**Um vikuskiftið bleiv eitt føroyskt Newcastle-fjepparafelag sett á stovn, og eftir stovnandi aðalfundin var lagið gott á monnum, tí fyrsti dysturin í nýggja kappingarárinum endaði við einum 3-1 sigri**

FÓTBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*





*Jóhann Lützen er ein av stigtakarunum til Newcastle Føroyar, sum er føroyska fjepparafelagið hjá Newcastle United.*
*Mynd: Teitur Joensen*

Áhugin fyri ensku Premier League er ovurhonds stórur í millum føroyingar, og hetta hevur m.a. borið við sær, at fleiri fjepparafeløg eru sett á stovn kring landið. Mitt í síðsta kappingarárið bleiv føroyska fjepparafelagið hjá Arsenal sett á stovn, og undan fyrsta dystinum í nýggja kappingarárinum í Premier League um vikuskiftið bleiv enn eitt føroyskt fjepparafelag sett á stovn.

Hesaferð vóru tað fjepparar hjá Newcastle United, sum høvdu tikið stig til at seta á stovn eitt fjepparafelag, og nakrir teirra møttust á Bryggjuni í Vestmanna leygardagin til stovnandi aðalfundin.

Tað eru teir báðir, Jóhann Lützen úr Klaksvík og Fróði Jacobsen, sum hava tikið stig til átaki, og hetta fall í góða jørð hjá Newcastle-fjepparum kring landið. Sjálvt um bert 12 mans møttu til stovnandi aðalfundin, so vóru fleiri afturat, sum høvdu boðað frá undan fundinum, at tey eisini ætlaðu sær at gerast limir í Newcastle Føroyar, sum fjepparafelagið eitur.

## Fantastisk byrjan

Og ikki kann sigast annað enn, at nýggja fjepparafelagið fekk eina fantastiska byrjan. Eftir fundin fóru teir allir at hyggja at fyrsta dystinum í nýggja kappingarárinum hjá Newcastle, har teir vóru á vitjan hjá Bolton.

Við undantaki av síðsta kappingarári, so fær Newcastle aloftast eina ringa byrjan uppá eitt kappingarár, men soleiðis var ikki hesa ferð. Felagið fekk nevniliga eina dreymabyrjan, og eftir bert 27 minuttum var støðan 3-0 til Newcastle við tveimum málum frá Martins og einum frá N'Zogbia.

Í seinna hálvleiki pyntaði Anelka um munin, men Newcastle vann dystin 3-1 og hevur sostatt fingið eina sera góða byrjan upp á nýggja kappingarárið.

Annars er vert at leggja afturat, at Newcastle Føroyar arbeiðir við at fáa eina heimasíðu, sum kemur at eita www.newcastle.fo. Henda verður ætlandi liðug heilt skjótt. Fjepparafelagið ætlar eisini at skipa fyri túrum til St. James' Park at hyggja at fótbólti, men nær fyrsti túrurin verður, er enn ikki greitt.

# Skjóta nógv mál

**Bíðað verður framvegis eftir avgerð um, hvør skal flyta upp saman við B68**

1. DEILD
*Jóannes Hansen*

Tað gongur sína gongd í næstbestu deildini. Trý tey fremstu vinna hvørja ferð, og trý tey aftastu tapa hvørja ferð.

Átta umfør resta, og tveir spurningar eru eftir at svara. Annar er, um tað verður FSV04 ella ÍF, sum fer at flyta upp saman við B68. Hin er, um tað verður KÍ ella kanska SÍ, sum fer at flyta niður saman við B36.

Í Formula deildini vórðu tað sunnudagin skorað átta mál í fimm uppgerðum ella 1,6 í miðal fyri hvønn dystin. Í næstbestu deildini var tað munandi meiri málríkt. Samlaða máltalið var 29 ella 5,8 mál í miðal fyri hvørja uppgerðina!

Eingin spenningur var í nakra staðni. Sigrarnir vóru allir sera sannførandi, og nú tykist tað sum um, at tað verður bíðað eftir nøkrum lykladystum, sum kunnu gera av, um tað skal verða FSV04 ella ÍF, sum skal fylgja toftamonnum upp í bestu deildina.

ÍF er framvegis tvey stig aftanfyri FSV04. Tískil hava fuglfirðingar ikki ráð at missa stig. Bæði ÍF og FSV04 skulu spæla á Svangaskarði. Innanhýsis uppgerðin millum FV04 og ÍF verður í Sandavági í 24. umfari, sum er á skránni 22. september.

Nú leygardagin fara fuglfirðingar út á Svangaskarð. B68 er favorittur, og um toftamenn fáa fulla úrtøku, so verður uppflytingin so at siga avgjørd, tá ið tað framvegis fara at resta sjey umfør. Tá verður stigamunurin frá B68 og aftur til ÍF átjan stig. Men nú fæst at síggja. ÍF, sum hevur fingið fult fýra tær seinastu ferðirnar, fer sjálvandi at leggja alla orku í.

HB við eitt nú Jákupi á Borg og Vagni Mohr Mortensen á liðnum vann hesa ferð 4-0 á KÍ. Harvið er HB so at siga sloppið undan hóttanini av niðurflyting.

B36, KÍ og SÍ skulu øll í hesi vikuni spæla útsettar dystir. Tað eru hesi feløgini, sum eru á aftastu plássunum.

**1. deild 19. umfar**

**ÍF-SÍ 7-1 (3-0)**
1-0: Viggo Johannesen 26.
2-0: Helgi L. Petersen 33.
3-0: Bartal Eliasen 34.
3-1: Jens Erik Rasmussen 54.
4-1: Bartal Eliasen 72.
5-1: Nenad Zaric 74.
6-1: Árni Petersen 76.
7-1: Helgi L. Petersen 85.

**LÍF-B68 0-4 (0-2)**
0-1: Jósup Henriksen
0-2: Dánial Hansen
0-3: Emil Olsen
0-4: Emil Olsen

**HB-KÍ 4-0 (2-0)**
1-0: Dánial Davidsen 7.
2-0: Tróndur Sigurðsson 24.
3-0: Tróndur Sigurðsson br 58.
4-0: Jákup Berg 86.

**FSV04-B36 5-1 (3-1)**
1-0: Heron 2.
2-0: Heron 4.
3-0: sjálvmál 17.
3-1: sjálvmál 34.
4-1: Jovan Panic 49.
5-1: Jógvan Holm 75.

**TB-NSÍ 6-1 (2-0)**
1-0: Óli Johannesen 16.
2-0: Olivur Abrahamsen 26.
3-0: Olivur Abrhamsen 59.
4-0: Allan Poulsen 63.
5-0: Olivur Abrahamsen 69.
5-0: Olivur Abrahamsen 71.
6-1: Robert Sørensen 83.